# Føroyingar á krabbaveiði

**Í hesum døgum fer ein nýggj verkætlan í gongd í føroyskari fiskivinnu**

FISKISKAPUR
*Rógvi Borðoy*


*Holgar Johansen úr Vestmanna verður skipari á Bergunn*

Eitt heilt ókent slag av fiskiskapi verður sett í verk við gamla Skansatanga, sum nú hevur skift navn til Bergunn.

Báturin fer fyrst og fremst at royna eftir einum krabbaslagi, sum enn ikki hevur fingið eitt føroyskt heiti. Á latínskum eitur slagið Chefion Affinis, men Finnbogi Hansen, reiðari á Bergunn, styttir tað Affinis. Reiðarin sigur harafturímóti, at spanskir keyparar ikki bert vilja hava hetta krabbaslagið. Teir vilja gjarna gera royndir við tindakrabbanum fyri at kanna, um eisini hann kann etast. Finnbogi Hansen sigur, at prísurin á Affinis er nøktandi, men vil ikki siga, hvør prísuri verður.

Teir leggja frá landi mikukvøldið, og fara út á djúpan sjógv at royna. Helst út á rennuna við Føroya Banka, sigur reiðarin Finnbogi Hansen. Hann sigur, at Nimb og Arctic Wolf hava gjørt onkran stuttan royndartúr eftir sama krabbaslagnum, og teir hava í øllum førum fingið okkurt í rúsurnar.

Tað eru teir báðir Finnbogi Hansen, reiðari, og Holgar Johansen sum hava tikið stig til verkætlanina. Holgar Johansen verður skipari á Bergunn.

### Gamal í gørðum

Skiparin Holgar Johansen er ikki óroyndur innan krabbafiskiskap. Hann hevur verið við til krabbafiskiskap í Grønlandi síðan 1998, og sostatt hevur hann verið við síðani byrjanina á krabbafiskiskapinum í Grønlandi. Samanborið við grønlendsk skip, er Bergunn nógv betri útgjørd, sigur Holgar Johansen.

Hann sigur, at tað fyrsta árið í Grønlandi var tað besta. Skipið, sum hann tá var við fiskaði fyri 90 milliónir krónur fyrsta árið, men Holgar Johansen sigur, at hann tá royndi eftir einum dýrari slagi av krabba, so tað skal man ikki rokna við í Føroyum.

### Trúgva uppá verkætlanina

Finnbogi Hansen sigur, at verkætlanin er sera spennandi, tí hon er tann fyrsta av sínum slag. Hann sigur, at tað er ringt at siga, hvat ein skal vænta sær burturúr verkætlanini, tí eingin hevur roynt hetta slag av fiskiskapi undir Føroyum, 600 rúsum at byrja við. Manningin telur átta, og reiðarin roknar við, at tað er nokk at byrja við.

Fyri at krabbin skal hava so góða góðsku sum gjørligt, má ...


*Soleiðis síggja krabbarúsurnar út*

ógjørligt at spáa um gongdina í framtíðini.

- Vit vita ikki, hvussu nógv er til av krabba, og heldur ikki, hvar hann livir. Men vit vita, at krabbin veksur seint, sigur Finnbogi Hansen. Og um hann bara livir í einum stað, er ikki so nógv til.

### Holgar Johansen ávarar

Skiparin ávarar ímóti at lata ov nógvar bátar sleppa framat krabbafiskiskapinum, serliga tey fyrstu árini.

Hetta byggir hann á royndirnar, hann hevur í Grønlandi, har roynt hevur verið eftir krabba síðan 1998.

- Vinnan í Grønlandi er í smildur, tí veiðitrýstið er ov stórt, sigur hann. Allur krabbin er longu uppfiskaður, og trupulleikin er, at krabbin ikki gerst kynsbúgvin til hann er 7 ára gamal, sigur skiparin frá.

Annars nevnir Holgar Johansen at Affinis, sum krabbaslagið eitur, eisini hevur verið fiskað aðra staðni í heiminum, og at krabbin longu er uppfiskaður nógvastaðni.

Av tí, at krabbaslagið ikki er tað sama sum í Grønlandi, sigur Holgar Johansen, at tað er torført at siga, hvussu tað fer at ganga. Í Grønlandi bleiv krabbin kókaður, og síðani frystur. Fyribils verður krabbin, sum Bergunn fiskar, frystur ráur, og skiparin sigur, at so gerst prísurin verri.

### Royndarloyvi

Holgar vónar, at tað fer at ganga krabbafiskiskapinum betur i Føroyum enn aðra staðni. Hann sigur, at tað ræður um at vera varin at byrja við, og mælir til ansni.

Fyribils hevur Bergunn so fingið royndarloyvi, sum reiðaríið noyðist at søkja um av nýggjum hvørt ár.

Hetta er ein sera spennandi verkætlan, sum Sosialurin fer at fylgja væl við.


*Fyrrverandi Skansatangi eitur í dag Bergunn, og skipið fer í hesum døgum á krabbaveiði undir Føroyum*

## Spennandi verkætlan

**Mourits Joensen frá Fiskirannsóknarstovuni er sera spentur uppá, hvat krabbafiskiskapurin hevur at bjóða**

FISKISKAPUR
*Rógvi Borðoy*

Mourits Joensen starvast á Fiskirannsóknarstovuni dagliga, og hevur stóran áhuga í krabbavinnuni. Hann sigur, at krabbin sum Bergunn fer at royna eftir, er púra ókendur á okkara leiðum.

- Krabbin er umleið eitt kg til støddar. Vit vita, at har er nakað at fáa av slagnum á Ytrabanka og á Bankarygginum. Men royndirnar, sum vit hava, siga í veruleikanum einki um stovnin, tí tølini eru so fá.

Mourits Joensen heldur fram, at hann vónar, at tað fer at bera til hjá einum báti at fiska alt árið, men sigur, at farvatnið har á leiðini er ringt, og at tað tí kunnu vera nógvir dagar, har ikki ber til at fiska.

Mourits Joensen endar við at siga, at hann vónar, at tað eydnast Bergunn at reka bátin, men hann hevur góðar vónir um, at tað fer at bera til.

- Vit eru komnir fram til, at vit skula hava okkurt um eitt tons av lidnari vøru um dagin fyri at fáa tað at bera til, sigur Finnbogi Hansen. Kostnaðurin av verkætlanini liggur um tvær milliónir krónur,

- Í dag er tað tað sama sum ein útróðrarbátur kostar, sigur reiðarin. Hann heldur ikki, at verkætlanin er dýr.

### Landa triðja hvønn dag

Bergunn fer til skips við

ligt, má Bergunn inn at landa umleið triðja hvønn dag. Krabbin er enn livandi, tá hann verður landaður, og komin á land verður hann slaktaður. Bein og kjaftar verða so tiknir av og sundurskildir í støddir. Síðani verður lidna vøran fryst og send av landinum.

Finnbogi Hansen sigur, at tað besta hevði verið at havt eitt størri skip, sum kundi framleitt lidna vøru umborð, so teir ikki vóru noyddir at koma inn at landa so ofta. So høvdu teir slaktað og fryst krabban umborð, og høvdu tí kunnað fiskað meir.

Hann sigur tað vera



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Arne Nørrevang 70



Hann er hálvur føroyingur, doktari og professari. Arne Nørrevang varð føddur í Fasterholt í Jútlandi 10. juli 1933. Mamma hansara, Anna Elisabeth Frederikke Djurhuus, var ættað úr Fuglafirði. Pápin, Peder Einar Nørrevang, var úr Køge.

Arne tók studentaprógv í Århus Katedralskole í 1952, og í 1960 gjørdist hann mag.scient. í lívfrøði á universitetinum í Keypmannahavn. Hann hevði kannað lomviga í Mykinesi, og serritgerð hansara var um atburðin hjá lomviganum. Í 1965 gjørdist hann doktari við einari ritgerð um búning av kynskyknunum hjá einum ávísum maðkaslag.

Sama árið fekk hann starv sum amanuensis í Keypmannahavn, síðani lektari í 1965 og dosentur 1965-83.

Hetta árið kom Arne Nørrevang til Føroya at starvast og her hevur hann livað og búð tey 20 árini, sum eru liðin síðani. Hann var lærari á Læraraskúlanum 1983-86, síðani savnsvørður á Náttúrugripasavninum og frá 1995 professari á Fróðskaparsetrinum. Eitt skifti var hann rektari.

Eitt av hansara stórverkum, sum føroyingar munna hava størstan áhuga fyri, er um fuglaveiðu. Við stuðli frá Carlsberggrunninum fór hann í 1975 undir eina miðvísa kanning av fuglaveiðuni hjá føroyingum. Kanningin bygdi fyrst og fremst á samrøður við veiðumenn ymsastaðni í oyggjunum. Tilfarið kom út í bók, sum hann kallaði Fuglefangsten på Færøerne. Hans Thomsen umsetti hana til føroyskt, og hon kom út í 1977 við titlinum Úr bjargasøguni.

Tað var annars longu sum blaðungur, at Arne fór undir at kanna fuglalívið í Føroyum. Frá 1946-50 ferðaðist hann her í summarfrítíðini og skrivaði greinar í vísindaligum tíðarritum og dagbløðum og vikubløðum í Danmark og Týsklandi um fuglalívið her.

Í 1988 gjørdist Arne Nørrevang stjóri á Havlívfrøðiligu Royndarstøðini í Kaldbak og leiðari fyri BIOFAR-ætlanini. Hetta er ein kanning av botndýralívinum undir Føroyum, og kanningin hevur víst, at her finnast smákykt, sum ikki eru funnin aðrastaðni í heiminum. Arne hevur skrivað nógvar vísindaligar greinar við støði í BIOFAR-kanningunum. Til 1995 vóru 36 vísindaligar greinar skrivaðar.

Arne Nørrevang eigur tvær døtur, sum eita Iben Angelica og Pia Monica. Hann er sambúgvi við Elin Súsannu Jacobsen úr Klaksvík.

### Jonna Krog Poulsen 45 ár



10. juli verður Jonna Krog Poulsen á Sandi 45 ár. Jonna er fødd og uppvaksin á Sandi, dóttur Annu Dahl úr Funningi og Óla Krog á Sandi. 6 ára gomul misti hon mammuna, og var hon 19 ára gomul tá pápin fór. Í 1977 tók Jonna útbúgving sum sjúkrahjálpari á Sjúkraliðaskóla Islands. Jonna er yngst av 4 systkjum. Hon hevur síðan 1983 arbeitt sum læknaskrivari hjá kommunulæknanum á Sandi. Tvær ferðir er hon vald í bygdaráðið, har hon eisini hevur verið skrivari í mong ár. Í 13 ár var hon í umboðsráðnum hjá Føroya Sparikassa. Hóast tornur á vegnum er hon altíð við sínum róliga og milda verumáta øðrum til hjálpar. Jonna er gift við Elis Poulsen og eiga tey børnini Miu 24 ár og Ólav Enna 20 ár.

## Tórbjørn og Heðin hjá drotningini

*Tórbjørn Mikkelsen og Heðin Mortensen í slotsgarðinum beint eftir vitjanina hjá drotningini.*



Fyrrapart mánadagin 7. juli 2003 vóru Tórbjørn Mikkelsen og Heðin Mortensen á Christiansborg til audiens hjá Hennara Hátign Drotning Margrethu. Tórbjørn Mikkelsen takkaði fyri heiðurin at vera útnevndur til Riddara av Dannebrog og Heðin Mortensen takkaði fyri heiðurin at vera útnevndur til Riddara av Dannebrog á 1. stigi.

3. juni 2003 bleiv Tórbjørn Mikkelsen, ið er stjóri á Toll-Skattstovu Føroya, útnevndur til riddara av Dannebrog-heiðursmerkinum eftir at hann tann 1. apríl 2003 hevði starvast á stovninum í 50 ár.

28. mai 2003 bleiv Heðin Mortensen tryggingarmaður útnevndur til riddara av 1. stigi av Dannebrog-heiðursmerkinum. Hendan heiður fær Heðin fyri tað arbeiði hann hevur gjørt innan ungdómsarbeiði, felagsarbeiði, lokalpolitikk, landspolitikk, umframt at hann hevur verið upp í og virkað fyri altjóða samstarvi á ymsum økjum. Heðin bleiv eisini Riddari av Dannebrog í 1991.

### Dagurin

**10. juli. Knútur kongur,** deyður í 1086. Hann varð myrdur fyri altarinum í St. Albans kirkju í Odense henda dag, og pávin skírdi hann halgimenni í árinum 1100. Hann fekk navnið Knútur hin Heilagi.